# Takk

Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum vóru við til at gera 90 ára føðingardagin so ógloymandi.

Samstundis ynski eg tykkum øllum eini góð jól og eitt av Hannarum vælsignað nýggjár.

**Bestu heilsanir**
**Astrid Vørðhamar**

# Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum vístu samkenslu og sum vóru um meg og mannin

**Pól Martin Abrahamsen**
av Strondum

ta síðstu tíðina hann var sjúkur, andaðist og var jarðaður!
Tøkk til starvsfólkið á Sjúklingaheiminum Tórshavn fyri alt tit hava verið fyri okkum síðani 2006.
Tøkk til prest og trúboðara í Keypmannahavn fyri ta umsorgan tit vístu okkum!
Tøkk til øll tykkum, sum stukku inn á gólvið meðan vit vóru heima. Tøkk til tykkara, sum sendu heilsanir til Danmarkar og komu at vitja!
Tøkk til familju, vinir, kenningar og øll tykkum kring landið, sum bóru okkum í bøn. Guð hoyrir allar bønir, og svarar eftir sínum vilja. Hann hevur sagt: »sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda«. Tøkk fái hann fyri tað!
Tøkk tit, sum tóku ímóti okkum á flogvøllinum og í kirkjuni, tá ið vit komu heim á nátt!
Tøkk tit, sum á ymiskan hátt stílaðu so væl fyri, við heimkomu, til kórsetanina, og til jarðarferðina.
Tøkk tit, sum luttóku vit talu, andakt, sangi, tónleiki og takk til kirkjutænarar.
Tøkk øll tit, ið hjálptu til við ervið, og fyri alt, sum varð borið mær.
Tøkk til starvsfelagarnar á Brimli, ið løgdu inn á Hólk.
Tøkk øll tit mongu, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til nýggja Missiónshúsið.
Tøkk til tykkara, sum á ymiskan hátt hava sent mær heilsanir, hava ringt og stukki inn á gólvið.
Guð signi tykkum øll!
Við ynski um eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Karen**

# Próvtøkur á Tekniska Skúla í Klaksvík

**Fríggjadagin vóru 17 lærlingar lidnir við skúlagongdina á Tekniska Skúla í Klaksvík í el-, maskin og timburyrkinum**



**Elektrikarar:** *Frá vinstru: Hans Erik Jensen, Oyri, JT-Eletric; Høgni Joensen, Leirvík, Sp/f El-Teknik; Jón Syderbø, Klaksvík, Fa. Sigurd Syderbø; Jónleif Petersen, Strendur, P/f Mekta; Beinir Danielsen, Glyvrar, P/f Mekta og Tummas Eli Bjartalíð, Klaksvík, Sp/f El-In*



***Maskinsmiðir:** Frá vinstru: Hans Jákup Johansen, Lambi, P/f FJM; Eli Mikkelsen, Klaksvík, P/f Normek; Sigurd Johannesen, Toftir, P/f FJM; Hanni Elmar Niclasen, Hvannasund, Sp/f Pomek; David Andreasen, Fuglafjørður, P/f KJ-Hydraulik*



***Timburmenn:** Frá vinstru: Uni Martinson Venned, Søldarfjørður, Smíðlist; Justinus Heini Hansen, Saltangará, TN-Bygging; Símun Petersen, Klaksvík, Sp/f Norðhús; Henry Heinesen, Klaksvík, Sp/f Malltek; Signar Højgaard, Klaksvík og Sp/f Karstin A. Joensen. Á myndini vantar Kaj Johannesen, Klaksvík, Sp/f Norðhús*



**Dagurin**
**23. november.**
**Klæmintsmessa**. Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Andlát og jarðarferðir

**Trúgvi Tausen**, ættaður úr Vági, andaðist í Íslandi sunnudagin, 75 ára gamal.

**Ada** (úttalast Æta) **Maria Olsen**, andaðist fríggjadagin, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður týsdagin klokkan 13 úr Vestmanna kirkju. Tey ið vilja minnast Adu, kunnu lata Føroya felag móti krabbameini eina peningagávu.

**Øivind Solbakk**, ættaður úr Kristianssundi í Noregi, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin, 18 desember, 62 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum í dag klokkan 18. Jarðaferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mánadagin, 22. desembur, klokkan 13.30.